# Kongshavn kann klára meira



Olaf Olsen, stjóri á landingarmiðstøðini Kongshavn.

Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com

**Landingarmiðstøðin Kongshavn umsetti 16 000 tons av upsa og øðrum hvítfiski undir 2003 - men hevur enn meira kapasitet**

FISKIVINNA
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Tey seinnu árini eru serskildar landingarmiðstøðir alt meira vorðin vanligur kostur í fiskivinnuni á landi. Hesin trendur er íkomin aftan á strukturbroytingar í vinnuni undir fyrru helvt av 1990unum og verður av mongum mettur sum eitt framstig í mun til ta traditionellu skipanina við fastari koppling millum framleiðslu og landing.

Reiðaríið Beta, kent fyri at eiga og reka teir sokallaðu Kuba trolararnar, gekk undan og tók tíðliga upp landing sum vinnuligt virksemi, í fyrstani við hjálp av verandi landingarplássum ið vóru knýtt at flakavirkjum kring landið. Áðrenn ta stóru kreppuna fyrst í 1990unum vóru eingi serstøk landingarpláss; flakavirkini virkaðu sum slík ístaðin. Beta byrjaði at landa fisk í Runavík í 1994; tvey ár seinni fekk felagið eina nýggja høll á bryggjuni í Saltangará og í fjør varð stovnað eitt dóttirfelag, Kongshavn, til at burturav fáast við landing og virksemi og tí sambandi.

Landingarmiðstøðin hjá Kongshavn tekur ímóti tíggjutúsundtals tons av fiski árliga. Runt roknað helvtin er fiskur frá skipum hjá Beta meðan restin er frá øðrum ið vilja gagnnýta tann stóra kapasitetin hjá miðstøðini. Millum annað teljast einir fimm-seks garnabátar millum teir trúgvu kundarnar og upsin er tann fiskur sum oftast kemur upp á land.

Men árið í fjør var ikki tað besta higartil, upplýsir stjórin Olaf Olsen.

– Vit landaðu 16 000 tons í 2003 aftur ímóti 22 000 tonsum í 2002, greiðir hann frá í samrøðu við Sosialin.

– Tað er greitt at vit kunnu klára meira enn vit gera í løtuni, hóast virksemið sum so er hampiliga lívligt. Trupulleikin í fjør var ikki minst verkfallið, men eisini tað at tað gekk so illa at koma av við fiskin í summar. Serliga var minni av gullaksi.

### Skifta út trolarar

Fyri einum góðum ári síðani fekk Beta tveir nýggjar Kuba trolarar, nevniliga 'Stelk' og 'Bak' úr Spania. Samstundis eru tríggir av teimum gomlu seldir, bókstaviliga talað í hvør sítt heraðshorn: ein til Russlands, ein til Gambia og ein til Argentina; tann síðst nevndi fór fyri einum mánað síðani úr Føroyum sína longu leið og skal koma fram ídag aftan á sigling non-stop yvir einar 7000 fjórðingar.

– Tað var ein partur av sáttmálanum við argentinar at vit skuldu sigla teimum bátin suður, upplýsir Ragnar S. Olsen, varastjóri á Beta.

Soleiðis eru trý pør av trolarum í rakstri meðan ein liggur stakur við kai. Sum skilst gongst væl við fiskiskapinum og teir nýggju trolararnir vísa seg at roynast væl.

– Fiskiskapurin hevur verið heilt hampiligur, heldur Ragnar S. Olsen fram.

– Tó er tað jú væl kent at upsaprísirnir ikki hava verið nakað at reypa av í seinastuni… Men teir nýggju bátarnir hava klárað seg stak væl upp á allar mátar.

Annars fyriliggur ein strategisk avgerð í Beta um at talið á trolarum hjá reiðarínum skulu minkast, úr átta niður í seks.

– Keypið av 'Stelki' og 'Baki' og sølan av teimum trimum er ein liður í at skifta teir átta eldru bátarnar út við seks nýggjar sum eisini eru nakað størri enn teir gomlu. Í løtuni eru teir sjey í tali og eftirsum at seks teirra partrola liggur 'Havhestur' nú við kai sum standby. 'Havhestur' hevur fiskiloyvi men í somu løtu vit bíleggja næsta trolara fer ein niðurteljing í gongd og fiskiloyvið má yvirførast innan tvey ár.

Kuba trolararnir vórðu keyptir í 1973 úr Kuba og vórðu í Noregi umbygdir í 1978 til ísfiskaveiði. Upprunaliga stóð Skipafelagið Føroyar sum keypari men trolararnir vórðu fluttir yvir í eitt reiðarí fyri seg, Beta, eitt systirfelag hjá Skipafelagnum.

# Eimskip rokna við einum góðum 2004

**Eimskip flyta ikki nógvan alilaks úr Føroyum og vænta ikki stórar broytingar í tí nýggja árinum**

FARMAFLUTNINGUR
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*



Tíggjutúsundtals tons av fiski fara árliga um landingarmiðstøðina hjá Kongshavn.

Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com

Meðan stórir partar av vinnulívinum útgera seg til at møta teimum minkingum í virksemi sum kreppan í alivinnuni hevur lagt upp til, so rokna Eimskip ikki við at merkja tað stóra til niðurgongd av hesum.

»Av tí at útflutningur av alilaksi eigur ógvuliga lítlan lut í okkara virksemi rokna vit heldur ikki við stórvegis broytingum,« sigur Joel undir Leitinum, sølu- og marknaðarleiðari hjá Eimskip í Føroyum.

Joel undir Leitinum hevði annars stórar vónir til árið 2003 men so kom verkfallið; eftir umstøðunum var úrslitið tá samanum kom tó nøktandi.

»Árið í fjør var ógvuliga gott tað er fram til verkfallið; tá fór alt fyri bakka. Vit høvdu ein fínan útflutning teir fyrstu fýra mánaðirnar men so var liðugt tá arbeiðsmarknaðurin stongdi… At vinna inn aftur tað mista aftan á eitt sovorðið verkfall tekur nógvar mánaðir. Vit høvdu tó fyrimunin at okkara skip sigldu sínar rutur kortini; tá var verri hjá teimum føroysku feløgunum sum máttu leggja síni skip.«

»Vit hava vónir um at árið í ár fer at líkjast árinum í fjør tó uttan nakað verkfall.«

»Og so vóni eg at politikararnir læra at halda fingrarnar burtur frá detailstýring og ístaðin leggja orkuna í veruliga, yvirorðnaða stýring.«

Tann føroyski marknaðurin fyri farmaflutning er sambært metingar verdur einar 500 milliónir krónur um árið, leysliga mett í góðsi eini 300 000 tons. Eingin av aktørunum á marknaðinum vil tó siga nakað stórvegis um hvussu stóran part teir eiga ella hvussu nógvur teirra umsetningur er.




























